## Aldubáran í Listaskálanum

VÁRKONSERT
*tíðindaskriv*

Várkonsertin hjá Aldubáruni er nú aftur á skránni. Árliga Várkonsertin, ið er á hvørjum árið í samband við Várframsýningina hjá listafólkunum, verður í Listaskálanum leygarkvøldið 5. mars kl. 19.00.

Tey fara at frumframføra 4 nýggj tónaverk eftir Kára Bæk, Atla Petersen, Trónda Bogason og Kristiani Blak. Harafturat verður spennandi filmur til tónleikin hjá Atla Petersen. Tað er Marianna Mørkøre, ið hevur lisið í London á "Ravensbourne College of Design and Communication", har ið hon fekk "the Media and Design Award", ið hevur gjørt film til verkið "**summi siga**" fyri solotrombon, ið Atli skrivaði til Andras Olsen í 1998.

Aldubáran hevur á mongu Várkonsertunum dúgliga nørt um vavið av føroyskum tónleiki og í so máta er henda Várkonsertin einki undantak. Konsertin byrjar sum sagt kl. 19.00 og høvi býðst at síggja Várframsýningina í steðginum av konsertini.

Aldubárumanningin hesuferð er: Anna Elisabeth Klett, klarinett, Andras Olsen, trombon og Thomas Gooseman, klaver og Marianna Mørkøre hevur gjørt filmin, ið verður vístur.

# Hjálparprestastarv gongur út



**Starvið sum hjálparprestur við Suðurstreymoyar eystara prestagjald, sum í gjør var fyribilssett í eitt ár, gongur nú út, og gerast skal av, um verandi starv skal halda fram, ella søkjast skal av nýggjum**

PRESTASETAN
*Edvard Joensen*

Fyri einum ári síðan varð Jóannis Fonsdal settur í starv sum hjálparprestur við Suðurstreymoyar eystara prestagjald. Starvið varð tíðaravmarkað til eitt ár. Hendan tíðin er nú um at vera farin.

Um mánaðarskiftið mars - apríl gongur setanin út, og so skal støða takast til, um presturin skal halda fram í starvinum, ella søkjast skal av nýggjum. Tá hevur verandi prestur sama møguleika sum onnur at søkja starvið.

Men áðrenn eit slíkt starv kann setast, ella setanin leingjast, skal presturin hava møguleika fyri eini hoyring, har hann sigur sína hugsan um starvið og starvsviðurskiftini. Tað ger so, at tað dregur eitt sindur út við avgerðini, skilir Sosialurin.

Um vikuskiftið var eitt ógvusligt lesarabræv prentað í bløðunum, har dómprósturin varð lagdur undir at hava koyrt prestin úr starvi.

Sosialurin hevur tosað við ymsar kirkjuligar myndugleikar, eins og hjálparprestin sjálvan, men eingin vil gera nakrar viðmerkingar til málið uttan tað, at einki er í slíkum uppáhaldi. Øll siga samsvarandi, at eingin avgerð er tikin í hesum málinum.

Tað er danska Kirkjumálaráðið, sum setir prestar í starv og loysir teir úr afur starvi. Áðrenn tað skulu ymsir partar, millum annað Prestafelagið, eisini hoyrast.

# Almenn tiltøk í Vágum

**Kvinnubólkurin í Vágum fer í vár at skipa fyri fleiri almennum tiltøkum. Tað fyrsrta verður týsdagin 1. mars**

TÍÐINDASKRIV

01.03.05 kl. 19.00: Almennur fundur í Bygdaskúlanum í Miðvági. Evnið hesaferð er skatturin, hvar fara krónurnar? Til hvønn, hvat og hví? Fyrilestur og tjak við Ingrid Henriksen.

Felagssangur og drekka er eisini á skránni.

08.03.05 kl. 20.00: Altjóða kvinnudagur í Bygdarskúlanum í Miðvági, yvirskriftin í kvøld er: "Kvinnur sum íbirtarar". Kvinnur í og úr Vágum, sum hava egna fyritøku, luttaka við innleggi og í tjakinum um hetta evnið. Um tú ætlar at stovna egna fyritøku, er møguleiki at fáa íblástur og góð ráð her. Á skránni er eisini felagssangur, drekka og undirhald við sangi og skemti.

26.03.05 kl. 14.00: Temadagur um ferðavinnu í Vágum undir yvirskriftini: "Dreymar og visiónir". Oda Andreasen heldur fyrilestur. Ólavur Poulsen hugleiðir. Fólk í ferðavinnuni og almennir mynduleikar í Vágum luttaka. Upplegg og tjak.

Hvussu kunnu vit fáa ferðavinnuna í oynni til at geva meira av sær? Brúka vit tað vit hava at bjóða? Eru vit ov bundin av tí, vit plaga at gera? Hvar er nýhugsanin? Verja vit tað vit hava, nóg væl? O.s.fr.

Tú kann sjálv/sjálvur koma við fleiri spurningum og svarum.

Hevur tú dreymar og visiónir, so kom við og ver við til at gera oynna betur at ferðast í, bæði hjá føringum og útlendingum.

Dagurin verður í Bygdarskúlanum í Miðvági.

21.04.05 kl. 19.00: Almennur fundur um friðing av gomlum býlingum í bygdunum í Vágum. Hvussu verja vit gamlar gøtur og hús? Skulu vit hava ein felags friðingarpolitikk fyri alla oynna ella skal hvør bygd sær syrgja fyri hesum?

Luttøka av serkønum og politikkarum.

